ALMANNA – OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

Tórshavn tann 5. juli 2007
J.Nr.: 0.21-200700461/1
Viðgjørt: RT

**Løgtingsmál nr. XX/2007: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg**

**§ 1**

Í lov for Færøerne um offentlig forsorg, jfr. lovbekendtgørelse nr. 100 fra 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 30. apríl 2007, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 24 stk. 1 nr. 2 verður aftaná seinasta punktum sett:
"Undantiknar frá hesum eru terminsútreiðslur av avdráttum til bústaðir, ið eru skipaðir sum vanlig ella serstøk lutaíbúðafeløg."

2) Í § 32 verður aftaná stk. 4 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um rakstur av vardum bústøðum, fyri persónar við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika."

3) § 40, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Útreiðslur sambært hesi lóg verða rindaðar av landskassanum. Undantikið frá hesum er gjald fyri náttavakt á eldrasambýlum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Endamálið við hesum uppsoti er at gera ávísar neyðugar konsekvensbroytingar í forsorgarlógini, sum standast av uppskotinum til løgtingslóg um lutaíbúðafeløg. Neyðugt er nevniliga at fáa til vega eina materiella heimild fyri, at bústaðir, ið eru skipaðir sum serstøk lutaíbúðafeløg, kunnu rekast sum vardir bústaðir sambært forsorgarlógini. Av umsitingarligum og lógartekniskum ávum verður samstundis skotið upp at gera tvinnar aðrar broytingar í forsorgarlógini.

Uppskotið til lutaíbúðafelagslóggávu leggur upp til, at bústaðir til fólk við serligum tørvi kunnu skipast sum serstøk lutaíbúðafeløg. Málbólkurin eru fólk við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika sum eru somikið væl fyri, at tey kunnu klára seg sjálvi í egnum heimi við ávísum stuðli frá Nærverkinum. Til henda bólkin av fólki við serligum tørvi verða roknað: Sálarsjúk, menningartarnað, rørðslutarnað, fólk við lættari ellisbreki og onnur við líknandi lættari brekum. Hinvegin eru fólk við tørvi á støðugari røkt ikki ætlað at verða búfólk í vardum bústøðum, ið eru skipaðir sum serstøk lutaíbúðafeløg.

Bústaðareindirnar í serstøkum lutaíbúðafeløgum verða roknaðar sum vardir bústaðir. Hesir eru sum frálíður ætlaðir at avloysa tey núverandi sambýlini, ið húsast í umbygdum sethúsum. Uppskotið til løgtingslóg um lutaíbúðafeløg leggur upp til, at hvørt búfólk fær egnan bústað (hjún tó undantikin), við øllum vanligum tilhoyrandi hentleikum. Harafturat verður innandura felagsøki, sum kan fevna um felagshøli til ymisk ítriv (verkstaður, handarbeiði v.m.), starvsfólkahøli, goymsla o.t.

Tá eitt serstakt lutaíbúðafelag verður rikið sum vardar íbúðir sambært forsorgarlógini, fíggjar landið raksturin við at rinda kostnaðin fyri starvsfólkið, meðan serstaka lutaíbúðafelagið rindar fyri rakstur og viðlíkahald av bygningunum. Skotið verður upp, at allar nærri ásetingar viðvíkjandi rakstrinum av hesum vardu bústøðum verða gjørdar í kunngerð, eins og frammanundan verður gjørt fyri allar aðrar bústaðir, ið eru skipaðir eftir § 32 í forsorgarlógini. Kunngerðin eigur at verða gjørd í samráði millum avvarðandi landsmyndugleikar (Almanna- og heilsumálaráðið, Nærverkið og Almannastovuna), kommunalu myndugleikarnar (kommunufeløgini), avvarðandi fakfeløg (Føroya Pedagogfelag, Heilsuhjálparafelagið, Almanna- og heilsurøktarafelagið og Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar) og tey ymisku áhugafeløgini á økinum (MBF, Javni, Landsfelag Pensjónista o.s.fr.).

Saman við tí nýggju materiellu heimildini til at áseta reglur um raksturin av vardum bústøðum, skipaðir sum serstøk lutaíbúðafeløg, verður skotið upp at taka fyrilit fyri einum umsitingarligum trupulleika, sum Almannnastovan væntast at fáa av bústaðarútreiðslum, í sambandi við útrokning av veitingum eftir § 9, stk. 1 í forsorgarlógini. § 24, stk. 1 nr. 2 ásetur nevniliga, at allir avdráttir í sambandi við terminsútreiðslur verða veittir við afturgjaldsskyldu. Kemur ein persónur sum býr í einum bústaði í einum vanligum lutaíbúðafelag í ta støðu, at viðkomandi skal hava forsorgarhjálp, kann tað gerast rættuliga fløkt at rokna veitingina út. Felagsútreiðslurnar, ið rindaðar verða til lutaíbúðafelagið, verða í uppskotinum til lutaíbúðafelagslógina roknaðar sum húsaleiga. Men hesar fara bæði til rindan av rentum og avdráttum av skuldini hjá lutaíbúðafelagnum, og tí kann ein tulkingarspurningur taka seg upp í sambandi við ásetingarnar í § 24, stk. 1 nr. 2 í forsorgarlógini. Harumframt rindar lutaeigarin bæði fyri rentur og avdráttir av møguligum lánum í sambandi við fíggingina av sjálvum lutinum, og sostatt er afturgjaldsskylda eisini fyri partar av hesum føstu útreiðslum.

Til tess at sleppa undan hesi sera fløktu lógarkravdu útrokningini av forsorgarhjálp verður skotið upp, at ongin afturgjaldsskylda verður fyri terminsútreiðslur, ið standast av avdráttum til bústaðir, ið eru skipaðir sum vanlig ella serstøk lutaíbúðafeløg. Á henda hátt verða hesar bústaðarútreiðslurnar javntsettar við húsaleigu, sum ikki er afturgjaldsskyldug.

~~Seinasta broytingin í uppskotinum hevur til endamáls at fáa samsvar ímillum eina ávísa áseting í~~ forsorgarlógini, og galdandi regluverk og fyriskipanir viðvíkjandi eldrasambýlum. Síðan í seinnu helvt av 90'unum hava tær kommunur ið eiga og reka eldrasambýli, rindað fyri náttavaktina á sambýlunum eftir rokning frá Nærverkinum. Henda siðvenja er síðan staðfest í galdandi kunngerð um eldrasambýli, sum hevur heimild í § 32, stk. 4 í forsorgarlógini. Til tess at

ósamsvar ikki skal vera millum rættarreglur, ið eru knýttar at forsorgarlógini, verður skotið upp at broyta orðingina í § 40 soleiðis, at allur ivi verður burturbeindur.

**Ummæli**

Uppskotið verður sent til ummælis hjá hesum hoyringspørtum:

Nærverkið, Almannastovan, Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, MBF, Javni, Landsfelag Pensjónista

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur sum frálíður fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Hetta kemst av, at landið átekur sær at rinda fyri rakstrarpartin ið viðvíkur starvsfólkum vm., sum verða knýtt at vardum bústøðum ið framyvir verða riknir sambært forsorgarlógini. Somuleiðis kann væntast, at smærri fíggjarligar avleiðingar sum frálíðir verða á lógarbundnu útreiðslunum til forsorgarhjálp orsakað av, at terminsútreiðslur, ið standast av avdráttum til bústaðir, ið eru skipaðir sum vanlig ella serstøk lutaíbúðafeløg verða javntsettar við húsaleigu, og tí ikki verða fevndir av afturgjaldsskyldu. Her verður tó neyvan talan um størri upphæddir

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, tí hesar rinda sum er fyri náttavakt á eldrasambýlum.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Uppskotið hevur sum frálíður umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Raksturin av vardum bústøðum ið framyvir verða riknir sambært forsorgarlógini skal skipast undir Nærverkinum, og hetta elvir til eina ávísa meirumsiting. Almanna- og heilsumálaráðið fær somuleiðis øktar uppgávur í sambandi við at ein kunngerð skal gerast um raksturin av vardum bústøðum ið framyvir verða riknir sambært forsorgarlógini

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar**
Lógaruppskotið hevur sum frálíður positivar sosialar avleiðingar tí tað miðjar ímóti at skapa tryggar rakstrarkarmar kring vardir bústaðir, ið framyvir verða riknir sambært forsorgarlógini

---

**Millumtjóða sáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Skyldur álagdar einstaklingum**
Lógaruppskotið áleggur ikki einstaklingum nakrar skyldur.

**Heimildir til annan landsstýrismann ella kommunur**
Lógaruppskotið gevur hvørji kommunum ela øðrum landsstýrismonnum nakrar heimildir.

**Talva – Avleiðingar**

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1.** Pkt. 1. í hesi grein ásetur, at terminsútreiðslur av avdráttum til bústaðir, ið eru skipaðir sum vanlig ella serstøk lutaíbúðafeløg ikki eru afturgjaldsskyldugir. Slíkar útreiðslur skulu í staðin javnsetast við húsaleiguútreiðslur, tá forsorgarhjálp skal roknast út.

Pkt. 2. í hesi grein er ein konsekvensbroyting ið stendst av uppskotinum til løgtingslóg um lutaíbúðafeløg. Ásetingin er ein materiell heimild fyri at áseta reglur fyri rakstrinum av vardum bústøðum, ið eru skipaðir sum serstøk lutaíbúðafeløg.

Pkt 3. í hesi grein hevur til endamáls at fáa samsvar ímillum eina ávísa áseting í forsorgarlógini, og galdandi regluverk og fyriskipanir viðvíkjandi eldrasambýlum.

**Til § 2.** Gildiskomuregla

Almanna- og heilsumálaráðið, xx. xxx 2007

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður